

# 10 TÆR BESTU ENSKU KRI

BRETAR DUGA FRAMÚR VÆL AT GERA **SJÓNVAPSDRAMA**, OG TEIR ERU SANNIR **MEISTARAR** TIL GÓÐAR KRIMIRØÐIR.TEY FLESTU MUNNU KENNA KLASSISKU SØGURNAR UM **SHERLOCK HOLMES**, **MISS MARPLE** OG **HERCULE POIROT**, MEN EISINI NÝGGJARI **RØÐIR**, SUM IKKI ERU EINS KENDAR, ERU FRAMÚR GOTT **UNDIRHALD**. HER ER EITT BOÐ UPP Á TÆR BESTU ENSKU KRIMIRØÐIRNAR



**KRIMI**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

## 1 Boyd
★★★★★★

Illsinti, órímiligi, men sera dugnaligi løgreglumaðurin Peter Boyd er leiðari fyri einari kriminaldeild, sum tekur uppaftur gomul mál, sum ikki vórðu uppklárað í síni tíð. Hetta er tað besta av enskum krimi, tú kanst uppliva. Fløktar morðgátur, sosialar tvístøður, framúr góðir sjónleikarar og spennandi klimaks. Waking The Dead, sum røðin eitur á enskum, er framleidd síðani 2000, og tey tíggju árini síðani eru 82 partar framleiddir. Nýggir partar verða nú framleiddir, og teir skulu sýnast næsta ár. Sjónvarp Føroya hevur sent røðina undir navninum Boyd.



*Peter Boyd er leiðari fyri kriminaldeild, sum tekur uppaftur gomul mál, ið ikki vóru uppklárað*

## 2 Wire In The Blood
★★★★★★

Forvirraði, men gløggi sálarfrøðingurin Tony Hill er stjørnan í hesi fantastisku ensku krimirøðini. Tony Hill verður biðin um at hjálpa løgregluni í einum máli, og tá tað gongur væl, verður hann biðin aftur og aftur. Fyrsti parturin av Wire in the Blood varð sendur í 2002, og punktum varð sent fyri røðina í 2008, tí hildið varð, at framleiðslan var ov dýr. 24 partar eru gjørdir av Wire in the Blood, og hesa røð kanst tú skaffa tær fyri rímiligan pening í dvd-pakkum. SvF hevur ikki sent Wire in the Blood.



*Tony Hill er tann forvirraði, men gløggi sálarfrøðingurin í »Wire in the Blood«*

## 3 Barnaby
★★★★☆☆

Barnaby kenna føroyingar væl, tí krimirøðin er í fleiri førum send í føroyskum sjónvarpi. Løgreglumaðurin Tom Barnaby uppklárar dráp, sum verða framd í bygdaligum umhvørvi í Onglandi. Midsomer Murders hevur verið í luftini síðani 1997, og higartil eru 73 partar gjørdir í røðini. Høvuðsleikarin John Nettles hevur boðað frá, at partarnir, sum nú verða famleiddir, verða hansara seinastu sum Tom Barnaby.

## 4 Inspector Morse
★★★★☆☆

Endeavour Morse er illsintur og besverligur løgreglumaður, men hann er eisini dugnaligur til sítt arbeiði. Honum dámar øl, klassiskan tónleik, gamlar bilar, skaldskap og krossorðagátur. Yndisítrivið er at finna stavivillur í skjølum og brøvum, hann fær. Røðin um Morse varð framleidd árini frá 1987 til 2000, og longu tvey ár seinni doyði høvuðsleikarin John Thaw av krabbameini. 33 partar eru í røðini.